# Eg trúgvi uppá Credo

**Credo merkir »Eg trúgvi« á latíni, og eru helst nógv, ið sita eftir við hesi kenslu, aftaná konsertina hjá Credo**

UMMÆLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Klokkan gekk móti sjey, tá fýra ungir norðoyingar og ein telda trinu á innipallin.

Forsangarin sat væl goymdur og bukaði eisini uppá trummur, tí tummurnar vóru í stóran mun bukaðar av hesum bólkið, sum serliga at byrja við hevði nógv vill løg.

Tað órógvaði eitt sindur, at sangarin eisini var trumuspælari, tí tá hann av og á kom fram á pallin var hann ein góður oddamaður.

Teldan hevði eisini sín stóra leiklut, hon tosaði millum sangirnar, kom við ymiskum ljóðum og spældi trummur, tá sangarin gjørdi tað, hann burdi gjørt.

Konsertin gjørdist veruliga góð tá bólkurin spældi lánilagið »Hurt« hjá Johnny Cash. Stutti forsangarin sá heilt stórur út og fylti væl út á pallinum. Aftaná spældu teir onkur løg afturat, og hildu hesi eisini eitt gott støði og raktu teir við hvørt okkurt inni í áhoyrarunum. Eisini var stuttligt at síggja, at fyrstu headbangararnir á degnum vístu seg, og hetta merkir, at Credo hevði gott samband niður av pallinum.

Samanumtikið ein deiliga vill konsert við einum bólkið, mann kundi trúð uppá, um teir funnu sær ein trummuleikara.




*Sangarin spældi væl á trummurnar, men betur hevði verið um hann bara sang*

# Bygdasligir ungir menn

**Tað var helst ein orsøk til, at Humble Cry vóru fyrstir á pallinum í dag. Teir vóru ikki nøkur stór tónleikalig uppliving, men sóu út til at hugna sær óført, og fáu fólkini á gólvinum sóu út til at hugna sær saman við teimum.**



*Humble Cry spældu ikki so væl og vistu ikki heilt hvønn tónleik teir spældu, men talan er um heilt ungar menn*

UMMÆLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Bólkurin byrjaði rættiliga popput, har teir spældu lovsangir. Eftir nakrar sangir skiftu teir forsangara. Hetta hækkaði framførsluna munandi, tí Meinhard Hansen, koyrdi meira futt í sum heild og framførðslan var meira rokkutt enn frammanundan. Hetta fekk eisini pallmyndina at síggja betur út, tí tær tríggjar bønargenturnar skaptu meira fjølbroytni enn tá teir poppaðu avstað.

Hesar tríggjar bønargentur vóru nakað bólkurin, í eini profeti hevði fingið boð um at hava á pallinum, og tað riggaði væl at tær gingu runt og fingu bønir frá fólkið, sum síðani vóru hongdar á stóra krossin á pallinum.

Kanska bólkurin ikki er klárur at spæla á einum festivali, men kanska er ætlanin als ikki, at teir skulu vera tað, men heldur spæla fyri stuttleikar, tí sjálvt um teir fingu sín kristna boðskap út, sá ikki út til at teir vóru samdir um hvussu boðskapurin skuldi borðreiðast.

# Alt er gjørt fyrr

**The Last Breath vóru næsti bólkurin á pallinum leygardagin**

UMMÆLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Limirnir í bólkinum spældu gittara baseraðan rokktónleik, og kenna fólk Creed og aðrar líknandi bólkar, hava tey hoyrt alt, The Last Breath gjørdu, fyrr.

Men sum heild var framførslan fín, teir koyrdu á alla tíðina, og tað ljóðaði á ongan hátt illa. Teir megnaði at fáa gott samband við lítlu fjøldina frammanfyri pallin, og áhoyararnir bæði hoppaðu og klappaðu gjøgnum alla konsertina.

Í samband við sangin sær út til, bólkurin hevur tørv á venjing, men hetta kann gerast nakað við.

Tað kann hugsast, at um bólkurin heldur fram og verður ordiliga samanspældur, kann tað ljóða heilt væl hjá teimum.

The Last Breath verða nokk ongantíð heimskendir, tí tónleikurin teir spæla hevur havt sínar bestu dagar, men spurningurin er sjálvandi hvørjar ætlanirnar hjá bólkinum eru.



*The Last Breath skulu ikki skammast av framførsluni, men teir kunnu heilt víst gerast betur*